LLINI Í TRONGISVÁGI LEYGARKVØLDIÐ 2. APRÍL KL. 21.00

## 5. KRISTLEIF ZACHARIASEN



**Kristleif Zachariasen**
- sang og kassagittar
**Rógvi á Rógvu**
- slagverk
**Arnold Ludvig**
- bass
**Heðin Ziska Davidsen**
- el-gittar
**Óli Olsen**
- tangentar

**»Fram um hinar framførarnar hetta kvøldið so hevði Kristleif eitt ríkt tekstunivers. Sorgblíðu tekstirnir hjá Kristleif dansaðu ein vakran vals við lekkrum tónum við slidegittara, harmoniku, akkustiskum bassi og jazzutum trummum.«**

**- Sosialurin eftir 4. umfar**

Kristleif Zachariasen kom fram sum solistur – singer/songwriter, tey kalla – í kappingini, sum Hafnia Lounge skipaði fyri. Hann vann hesa tónleikakapping, og síðani hevur hann bæði spælt nógv til tiltøk og givið fløgu út.

Hesaferð fer hann at spæla saman við einum bólki, sum hann hevur spælt við í eina tíð. Talan er um tónleikarar, sum eru kendir frá nógvum øðrum samanhangum og hava drúgvar royndir.

Samstarvið teirra millum byrjaði við útgávuni hjá Kristleif, Litleysir Blettir, og tað heldur síðani hildið fram. Nú fara teir eisini at royna seg í Prixnum.

Tað er Kristleif Zachariasen, sum skrivar sangirnar hjá bólkinum, og tónleikurin er ein blanding av poppi, fólkatónleiki og country.

Kristleif Zachariassen kom víðari frá 4. umfari, tá ið Terji Rasmussen Band eisini kom víðari.

## 6. GOGO BLUES



**Uni R. Debess**
- sang og gittar
**Rógvi á Rógvu**
- trummur
**Arnold Ludvig**
- bass

**»GoGo Blues komu, spældu og sigraðu. Uppá allar mátar vóru GoGo Blues í einum klassa fyri seg í Fuglafirði. Við teirra royndum og dygdum vóru teir møguliga favorittar hetta kvøldið, men at teir skuldu vera so cool og borðreiða við einari so einastandandi framførslu, var eitt sera positivt yvirraskilsi.«**

**- Sosialurin eftir 1. umfar**

Bólkurin GoGo Blues er ikki bara tann mest virkni blues-bólkurin í landinum, hann er eisini ein tann einasti veruliga virkni blues-bólkurin her á landi.

Mannaður við trimum góðum tónleikarum hevur bólkurin verið nógv at hoyrt seinastu tíðina. Tveir av tónleikarunum eru royndir tónleikarar, meðan oddamaðurin er nakað feskari, hóast hann hevur gjørt sera nógv við tónleikin seinnu árini.

Rógvi á Rógvu spælir trummur og Arnold Ludvig spælir bass, og teir báðir tónleikararnir leggja ein sera góðan og tryggan botn undir tónleikin hjá fólkinum. Síðani er tað uppgávan hjá Una R. Debess at spæla gittar og syngja í bólkinum, og tað gera hann sera væl. Hann hevur næstan spesialiserað seg í at spæla blues-tónleik, og tað ger hann bæði við orku og innihaldi.

GoGo hevur ikki bara spælt blues-tónleik hjá øðrum, teir í bólkinum hava eisini skrivað tónleik sjálvir, og partur av hesum er komin út á fløgu.

GoGo Blues var við í 1. umfari og komu víðari saman við Lama Sea.

## 7. TERJI RASMUSSEN BAND



**Terji Rasmussen**
- sang og akustiskan gittar
**Hjalti Joensen**
- el-gittar
**Rógvi á Rógvu**
- trummur
**Arnold Ludvig**
- bass
**Magnus Johannesen**
- keyboard og kór

**» Tað var ikki nakað nýtt »Eros« ella »Eg flýggji til tónleikin« millum løgini, og røddin hjá Terja hevur ljóðað betur. Hóast tað so var hetta nakað tað besta, vit hava hoyrt frá Terja í fleiri ár. Tað var ikki nakað beinleiðis nýtt, men hinvegin so var tað so hamrandi væl leikt og framførslan hjá Terja var so mikið góð, at fá mundu ivast í, um Terji ikki fór at koma víðari.«**

**- Sosialurin eftir 4. umfar**

Terji Rasmussen var við í bólkinum, sum vann fyrstu Prix Føroyar kappingina í 1995. Tá var rockbólkurin Moirae tað stóra nummarið, men hann er síðani farin í søguna.

Nú er Terji Rasmussen viðaftur í Prixnum sum sangari í sínum egna bólki. Hann hevur havt onkra einstaka gestaupptraðkan sum kórsangari, men nú verður tað við allari orku og egnu sangum, at hann leggur í vaðið aftur.

Terji Rasmussen hevur fingið nakrar av teimum tónleikarunum, sum hann hevur spælt sera nógv saman við gjøgnum árini, at spæla saman við sær hesaferð. Tríggir av tónleikarunum vóru við í tiltikna bólkinum Føstufressar.

Terji Rasmussen hevur seinnu árini spælt javnan til konsertir og dansir kring landið, og tað hevur hann gjørt við sínum egna bólki. Terji kann framføra eina langa røð av kendum sangum, sum hann hevur skrivað gjøgnum árini, men til Prixið eru tað nýggir sangir at hoyra frá honum.

Terji Rasmussen Band kom víðari frá 4. umfari, tá ið Kristleif Zachariassen eisini kom víðari.

## 8. EYÐUN NOLSØE



**Eyðun Nolsøe**
- sang og gittar
**Kim Hansen**
- keyboard og sang
**James Olsen**
- trummur og sang
**Jóhannes á Rógvi Joensen**
- bass
**Jens Marni Hansen**
- gittar og sang

**»Vápnaður við fýra nýggjum sangum og einum framúr góðum bólki setti Eyðun Nolsøe seg heilt klárt á eina tónleikaliga trúnu. Tað ber kanska til at seta spurnartekin við nýskapan og yvirraskilsi, men tá ið tað snúði seg um tónleikaliga handverkið, var tað klassamunur millum Eyðun Nolsøe og hinar bólkarnar.«**

**- Sosialurin eftir 3. umfar**

Eyðun Nolsøe er ein royndur og kendur tónleikari í føroyskum popptónleiki. Hann hevur øll árini síðani 1983 spælt við bólkinum Frændur, sum hesa tíðina síðani má vera størsta føroyska navnið í tí heimliga tónleikaheiminum. Eyðun Nolsøe hevur eisini roynt seg sum solistur og í samstarvi við onnur – millum annað í fleiri ár saman við Terja Rasmussen. Nú skal hann kappast við Terja Rasmussen um eitt pláss í finaluni í Prix Føroyum.

Eyðun syngur, spælir gittar og skrivar sangirnar til Prix-framførsluna hesaferð. Afturat sær hevur ein tónleikararnar, sum vanliga manna bólkin Showmenn. Hetta eru royndir tónleikarar, sum eru væl og virðiliga samanspældir eftir ein hóp av framførslum síðstu árini.

Eyðun Nolsøe spælir popptónleik við føroyskum tekstum.

Eyðun Nolsøe var við í triðja innleiðandi umfari og kom víðari saman við Lawetz.